# TILTØK

**Gudstænastur**
**3. Sunnudag eftir páskir**
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Sonja Klein
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11, Bergur D. Joensen. Talvan gongur í Argja kirkju fyri Bláa Kross. Barnakór syngur
***Kaldbak:*** kl. 12, altarg., Jóannis Fonsdal
***Kvívík:*** kl. 12, Marjun Bæk
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
***Bøur:*** kl. 11, David Johannesen
***Funningur:*** kl. 12, messa, Emil Olsen
***Norðskáli:*** kl.12, Sverri Steinhólm
***Gøta:*** kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Jónsvein Bech
***Glyvrar:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altarg.
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12, Jógvan Fríðriksson
***Æðuvík:*** kl. 17.30, Jónsvein Bech
***Fuglafjørður:*** kl. 11,
***Funningsfjørður:*** kl. 16, Uni Næs
***Sjúkrahúsið:*** kl. 10,
***Christianskirkjan:*** kl. 11,
***Kunoy:*** kl. 12.15, Hans Eiler Hammer
***Hvannasunds kirkja:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14,30, Elsa funding
***Sands kirkja:*** kl. 12, altarg., Hans J. Joensen, biskupur
***Hov:*** kl. 11,
***Sumba:*** kl. 13, Patrick de Neergaard

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har Absalon Áargarð og Jákup Alberg Berg tosa um evnið »At seta sær fyri«. Kl. 11.30 samvera við drekka. Á tilbiðjanaðarmøtinum kl. 12 er evnið »Lívsandi Guds – partur 2« Jógvan Z. talar. Barnaansing undir møtinum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.
Týskvøldið kl. 20 verður »Salt skeið – fjórða trin – tilbiðjan úti og heima« skeiðið heldur fram leygardagin 23. apríl frá kl. 13 til 17.
www.livdin.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Tóra Slættalíð, kl. 14 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Møti v/Eivind Frøen.
Mikumorgun kl 7.00 bøn.
Verið øll hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti, kl. 21.30 Bíbliugransking: Dánielsbók.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóannis Fonsdal, Manskórið syngur.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardag Familjudagur – byrjar kl. 16.
Sunnudag vitja Siggi og Ranvá úr Íslandi.

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnu-dagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 Evangel. møti.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.gospel.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Una Næs presti. Evnið: Hábakukk profetur.
Mánadagin kl. 20 í KFUK: Ung vaksin hittast.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir.
Týsdagin kl. 17 Várgleði fyri børn.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Fríggjadag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bradley, prestur, í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.
www.katolsk.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 einki morgunmøti vegna hjúnabandslegu. Kl. 18 Møti við Eivind Frøen.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.

Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. www.filadelfia.fo

**Skúlin í Kaldbak**
Evangel. møti verða í skúlanum í Kaldbak leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Talarar: Palli Højgaard og David Bech. Sangur: Herman og Gigga, Julius, Tórmund og fleiri.

**Saron, Vestmanna**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18.00, luttøka verður úr Vík. Verið hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Sigfred Johannesen og kl. 20.30 Ungdómsmøti.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Familjumøti fyri alla familjuna verður í kirkjuni sunnudagin kl. 16 við Jan, Nancy og Barnakórinum. Aftaná familjumøti verður ábit í Meinigheitshúsinum. Øll eru hjartaliga vælkomin. Av tí at familjumøti er, verður einki sunnukvøldsmøti.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti. Hendrik Olsen talar. Ársgáva til Heimamissiónina verður innsavnað. Aftaná verður náttturði í kjallaranum. Hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Inga Magnussen talar.
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.

**Vágafólk**
Dýrabiðidagsstevna verður í døgunum 22.-24. apríl í bygdarhúsinum í Miðvági og missiónshúsinum Libanon í Sørvági, nærri verður lýst í komandi viku.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við ungdómskórinum av Strondum. Drekka aftaná.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Jákup Berg.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Malmberg Olsen. Barnamøti kl. 17. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Jógvan presti.

**Bygdarhúsið í Tjørnuvík**
Møtir og sangkvøld verður hesar dagar.
Fríggjakvøldið kl. 19 Glyvrakórið syngur og vitnar.
Leygarkvøldið kl. 19 Sangkvøld við luttøku av Magna Christiansen, Ruth og Ingibjørg Thomsen, Libanon systranar, Trioin á Soli Deo Gloria, Gulak og Jónhilda Hansen.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Snorra Brend. Mektam syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin til møtini.

**Konsert í Fríðrikskirkjuni**
Konsert verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum sunnudagin 17. apríl kl. 16 við luttøku av kirkjukórinum. Á skránni verður eisini einrøddaður sangur eins og høvi verður at lýða á instrumentalan tónleik við cello og floytum.

**Samkoman Lívsins Orð Saltangará**
Sunnudagin er møti kl. 10.30 v/ Kára Jaocbsen.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Kirkjukjallarin, Gøta**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20 við Eivind Mouritsen úr Havn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Mizpa, Eiði**
Sunnudagin kl. 18 Møti við Jógvan Zachariasen. Evnið er bøn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Eitt øðrvísi møti kl. 18 við Jónsvein Simonsen. Evnið: »Guðs styrki«. Náttturði verður aftaná.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður leygardagin kl. 20. Evnið verður »Vinur syndarans« v/ Frits Thomsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli. Familjumøti verður kl. 17 og ungdómsmøti kl. 21 við Poul Jóhannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Hanus Lassen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl.13.30 Sunnudagsskúli og kl.18 Møti við Eivinn Bringsberg. Evni: Jesu blóð.
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**Soli Deo Gloria**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús »Ung skipa fyri«.
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við Poul Jóhannes Joensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 19 kemur ungdómurin saman.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 20 Evangel. møti, Svenning av Lofti talar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Høvi verður at geva eina gávu til Heimamissiónina í Nesvík.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin verður morgunmøti kl. 11 við Youth with á mission og møti kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30.
Mikukvøldið 4. mai kl. 20.30 verður hugnakvøld við Marjun Bæk.
Kristi Himmalsferðardag kl. 13.00 verður føroysk gudstænasta í Háteigskirkju, Marjun Bæk prædikar. Aftaná verður boðið til kaffi á Sjómansheiminum.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 23. apríl giftast í Slotskirkjuni í Hillerød Bettina Nilsson, Argir og Thomas Vestergaard, Slangerup. Brúdleypsadr.: Hotel Søfryd, Søfrydsvej 8-10. 4040 Jyllinge.

Hósdagin – Kristi himmalsferðardag – tann 5. mai 2005 kl. 17.00 í Skopunar kirkju giftast Leila Cardinal Simonsen og Thomas Jacob Kjærbo, Skopun. Veitslan verður í bygdarhúsinum Samljóð í Skopun kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 505005 ella 361905 innan 25. apríl.

Fríggjadagin 6. mai giftast Olga Kristina Eysturstein og Sigmund Petur Skorastein, Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443110, 443046 ella 229145 í seinasta lagi 27. apríl.

## GULLBRÚDLEYP

24. apríl kunnu Herborg og Páll Joensen, Leirvík, halda gullbrúdleyp. Veitslan verður í Bygdarhúsinum 23. apríl kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá seinast 17. apríl á tlf. 443011, 443058 ella 443398.

## KONFIRMATIÓN

Sunnudagin 24. apríl verður Egil Hansen, Fynsvej 20, 9900 Frederikshavn, konfirmeraður. Egil er sonur til Eileen Hansen og Snæbjørn Eysturberg.

Dýra biðidag 22. apríl konfirmerast í Højelse kirkju Maria Juda Húsgarð, dóttur Marjun og Hans Hendrik. Bústaðurin er: Strædet 8, Lellinge, 4600 Køge.

## 60 ÁR

11. mai fyllur Ingeborg Vinther, Vágur, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í VB-húsinum´i Vági leygarkvøldið 21. mai kl. 19.00. Tey, ið vilja vera við til føðingardagshaldi, verða biðin um at siga frá á tlf. 373427, 312101 ella 212102 innan leygardagin 7. mai.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Verið tí ikki óskynsamir, men skiljið, hvat Harrans vilji er!«*
*(Efes. 5,17)*

Sum kristin liva vit av náði Guds. Vit hvíla í tí, Jesus hevur gjørt fyri okkum. Grundvøllur okkara er Kristus. Vit fingu Jesus til faðir og harra. Hetta hendi í heilagu dópsstund okkara.

Vit eru nýggj menniskju og endurfødd at hoyra Gudi til. Hetta geldur bæði tá talan er um trúgv okkara og tá talan er um atferð okkara. Vit hava kærleikans Gud til faðir og harra. Og vit liva nú av náði Guds og vit liva í trúnni á frelsaran. At trúgva er at lata seg sannføra dag og dagliga av kristna boðskapinum. Tað er at venda um dagliga til Gud, sum hevur umsorgan fyri okkum. Hann hevur bæði andliga og tímiliga umsorgan fyri okkum. Hesin Gud er okkara Gud.

Tað er hetta, dópur okkara merkir. At trúgva er at vilja hava við henda Gud at gera. Tað er at tulka lív sítt út frá skapara og frelsara okkara. Tað er at rokna við hesum Gudi bæði í gleði og sorg, bæði í viðráki og mótráki. Tað er lata sær siga av honum. Vit verða sum kristin leidd av hesum Gudi. Hann sannførir og leiðir og stýrir lívi og tilveru okkara. Vit verða leidd av Guds anda.

Uppgáva okkara er nú at spyrja eftir, hvat Guds vilji er. Guds vilji er tað góða, tað sanna og uppbyggiliga. Gud vil alt, sum er gott fyri okkum og næsta okkara. Hann vil, at vit eru heil og sonn og at vit útinna tað góða. At vit gera lívið vert at liva bæði fyri okkum og næsta okkara.

Alt eigur at miðja ímóti kærleika og tolsemi og sannleika. Okkara uppgáva er at spyrja eftir, hvat Harrans vilji er. Og hann vil alt, sum gott er. Latum okkum so gera tað, ið gott er og vit vilja av sonnum liva. Tí av sonnum at liva, er at liva í harmoni við sín skapara og frelsara og í harmoni við lívið og næstan.

Hetta er Harrans vilji við lívi okkara.
Amen

**David Johannesen**